# Vilja hava føroyingar í Oljutingið

JAN MÜLLER

Í annaðkvøld klokkan 19 verður fundur á Hotel Hafnia, har ætlanin er at stovna felagsskapin „Oljutingið“. Endamálið við hesum felagsskapi er at skipa fyri fundum, fyrilestrum og øðrum tiltøkum, har tað verður kunnað og skift orð um oljuvinnu og tað virksemi, sum er knýtt at henni.

Tað eru nøkur fólk, sum onkursvegna hava tilknýti til tað komandi oljuvirksemið, ið hava tikið stig til at stovna eitt sokallað oljuting.

Ein av stigtakarunum, Alex Buvik, sum arbeiðir í Oljumálastýrinum, vónar, at nógv áhugað koma til stovnandi fundin í annaðkvøld. Talan er ikki um eitt fakfelag ol. Hetta er ein áhugafelagsskapur, sum skal vera karmur um kunning og kjak um oljuspurningar, og har tað verður høvið til at taka upp til viðgerar fakligar spurningar og viðgera hesar meira neyvt enn tá teir t.d. verða umrøddir í miðlunum og á øðrum stað.

-Kunnu vit við slíkum felagsskapi vera við til at kunna um oljuvinnuna og skapa orðakifti, so kann tað hava samfelagsligan týdning sigur Alex Buvik.

Longu fyrsta kvøldið er ætlanin at leggja út við tveimum fyrilestrum. Herálvur Joensen fer at tosa um evnið „Ein útbjóðing - nógvar avbjóðingar“, og Gunnvør Balle um „Samstarvsavtalur“.

Ætlanin er at skipa fyri øðrum fundum í heyst. Tá kundi t.d. eitt oljufelag greitt frá, hvussu tað hevur upplivað og virkað í útbjóðinginartíðini. Seinni, tá boring kemur í gongd, kann hugsast, at umboð fyri borifelag kundi greitt frá osfr. Evnini fara helst ikki at tróta, nú er so bara talan um at koma í gongd.

Tað, sum mest minnir um komandi oljutingið, er norska felagið „Petroleumsforeningen“. Alex Buvik heldur annars, at vísir tað seg, at talan verður um eina týðandi oljuvinnu, so vilja uppgávurnar hjá Oljutinginum eisini blíva meira umfevnandi, ja soleiðis at man ein dag fer at skipa fyri skeiðum ol. Men tað vil tíðin vísa.

Oljutingið er bæði fyri einstaklingar og virki. Limagjaldið fyri einstaklingar verður 200 kr. og fyri feløg 1500 kr. um árið.

Hinir stigtakararnir til felagsskapin eru Magni Arge, Geir Atle Rishovd, Dávid Reinert Hansen, Jan Mortensen, Martin Heinesen og Peter Even Djurhuus.

# Sjálvstýrisflokkurin samdur um fullveldismálið

*Hóast ósemju í Sjálvstýrisflokkinum um fullveldismálið undan landsfundinum, stuðlar ein samdur flokkur landsstýrinum eftir landsfundin leygardagin*

JOHN JOHANNESSEN



*Frá landsfundi Sjálvstýrisfloksins: Sámal Petur í Grund, løgtingsmaður, Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna og Eyðun Anthoniusen*

Landsfundur Sjálvstýrisfloksins tekur undir við samgonguni í samráðingunum viðvíkjandi ríkisrættarligu støðuni. Harafturat leggur landsfundurin áherðslu á, at fást má ein sáttmáli, sum Føroya fólk við eini fólkaatkvøðu tekur undir.

Hetta er niðurstøðan hjá landsfundi Sjálvstýrisfloksins um fullveldismálið.

Landsfundurin varð hildin í Runavík leygardagin. Fólk høvdu frammanundan fundinum væntað ein harðan fund, tí áðrenn fundin høvdu fleiri røddir úr baklandi floksins verið frammi í miðlunum og víst sína ónøgd við førda politikkin í fullveldismálinum. Men so varð ikki. Landsfundurin gjørdist púra samdur um at halda fram at stuðla landsstýrinum,

### Samd um stig fyri stig politikk

Edvard Hermansen, sum er nýggjur formaður í flokkinum, sigur, at tað er ein samdur Sjálvstýrisflokkurin, sum eftir landsfundin stuðlar Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu, í hennara leikluti í fullveldismálinum. Tó leggur hann dent á, at Sjálvstýrisflokkurin vil arbeiða fram ímóti fullveldi stig fyri stig. Men hann vísir á, at vit í løtuni eru í einari samráðingarstøðu, og tí ber ikki til at siga, um førdi politikkurin er stig fyri stig politikkur.

– Vit kunnu ikki taka støðu til fullveldismálið fyrr enn eitt endaligt sáttmálauppskot fyriliggur. Tí stuðla vit landsstýrinum í samráðingunum og fara at taka støðu til endaliga sáttmálauppskotið, eins og allir aðrir føroyingar, sigur Edvard Hermansen.

Nýggi formaðurin sigur, at hann ikki kendi til nakra ósemju í Sjálvstýrisflokkinum um fullveldismálinum undan landsfundinum. Einastu ábendingarnar um ósemju fekk hann úr fjølmiðlunum.

– Sjálvsagt er ein flokkur ikki púra samdur í einum og øllum. Men vit eru vorðin samd um orðingarnar í landsfundarsamtyktini, sigur Edvard Hermansen.

### Tók seg aftur

Ronald Poulsen, sum seinastu árini hevur verið formaður í Sjálvstýrisflokkinum, boðaði á landsfundinum leygardagin frá, at hann ikki ynskti at verða afturvaldur. Orsøkina segði hann vera, at hann vegna tvørrandi tíð ikki fekk røkt formansstarvið til lítar. Tí fekk flokkurin nýggjan formann, og er hann Edvard Hermansen.

Dánjal Petur Lamhauge, sum bæði hevur verið formaður, næstformaður og vanligur nevndarlimur í Sjálvstýrisflokkinum, tók heldur ikki við afturvali. Í hansara stað varð Jytta Juul vald.

Limirnir í nýggju nevnd Sjálvstýrisfloksins eru Edvard Hermansen, formaður, Schumann Hansen, næstformaður, Ronald Poulsen, Jytta Juul, Rosely Reynstind og Absalon Absalonsen.

# Foighel vitjar grundlógarnevndina

JOHN JOHANNESSEN

Fyrrapartin í gjár vitjaði kendi professarin í altjóðarætti, ES-rætti, skattarætti og mannarættindum, Isi Foighel, grundlógarnevndina. Hann skuldi á hesum tólvta regluliga fundi nevndarinnar greiða frá um ymisk evni í grundlógarhøpi.

Isi Foighel hevur undirvíst og granskað í Danmark, USA og Ísrael. Eisini var hann danskur skattamálaráðharri í Schlüther stjórnini frá 1982 til 1987, og frá 1984 til 1987 var hann eisini fólkatingslimur.

Isi Foighel umboðaði eisini Danmark í altjóða rættarmálinum um marknatrætuna í Norðsjónum við serligum áhuga fyri Føroyar. Harafturar var hann eisini við í nevndini, sum fyrireikaði grønlendska heimastýrið.

Seinnu árini hevu Isi Foighel serliga fingist við mannarættindi, bæði sum dómari í europeiska mannarættindardómstólinum í Strasburg og sum høvundur og granskari. Isi Foighel hevur í virki sínum víst á nógv øki, har mannarættindini eru ov lítið vird. Eitt nú hevur hann víst á, at mannarættindini ikki verða vird á skattaøkinum.

Av álitisstørvum hevur Isi Foighel millum annað verið limur í donsku UNESCO-nevndini, donsku flóttafólkanevndin og serligu ST nevndini, ið skal gera enda á rasismu.

Isi Foighel hevur gjørt sera nógv fyri at gera lóg og lógarmál skiljandi fyri vanlig fólk, og hevur m.a. skriva bøkurnar “Kend din menneskeret” og “Jura er ikke nok”.

Isi Foighel er jødi, men flutti í 1933 til Danmarkar. Undir krígnum búði hann í Svøríki.

Kendi professarin helt í gjárkvøldið fyrilestur í Læraraskúlahøllini undir heitinum »Gælder menneskerettighederne«. Grundlógarnevndin sigur í tíðindaskrivi, at hesin fyrilestur kann síggjast sum ein liður í arbeiðinum fyri at kanna møguleikarnar fyri at stovna løgfrøðiliga gransking og undirvísing í Føroyum.



*Isi Foighel saman við Jóan Paula Joensen, formanni í grundlógarnevndini*

# Fíggjarnevndin tarnað hernaðarkanningini

*Løgmaður setti 400.000 kr. av á fíggjarlógini til hernaðarkanningar, men undir fíggjarlógarviðgerðini avgjørdi fíggjarnevndin at skerja Løgmansskrivstovuna við 500.000 kr. á somu høvuðskonto. Hetta harmast løgmaður um í svari til Henrik Old, løgtingsmann*

ÓLAVUR Í BEITI

Henrik Old hevur spurt løgmann um skjøl í eystureuropeiskum skjalagoymslum, og vildi nú hava at vita frá løgmanni, hvør veruliga orsøkin er til, at løgmaður ikki vil kanna loynilig skjøl í eystureuropeiskum skjalagoymslum.

Í svarinum, sigur løgmaður, at hann hevur fyrr boðað frá í svari uppá fyrispurning frá Bjarna Djurholm, at tað hevði verið áhugavert at sett kanningar í verk til tess at útvega søguligan kunnleika um eystureuropeisku skjalagoymslurnar og um sjovjetisku ávirkanina í Føroyum undir kalda krígnum.

– Í sama svari varð eisini nevnt, at tað var hóskandi, at peningur til endamálið varð settur á fíggjarlógina fyri ár 2000, sigur Anfinn Kalssberg.

Og tí setti løgmaður 400.000 kr. av á fíggjarlógini fyri ár 2000 til hernaðarkanningar. Men undir fíggjarlógarviðgerðini avgjørdi Løgtingsins fíggjarnevnd at skerja Løgmansskrivstovuna við 500.000 kr. á somu høvuðskonto, upplýsir løgmaður í svarinum, og sigur, at tí mátti Løgmansskrivstovan meta um sína peninganýtslu fyri ár 2000 av nýggjum.

– Grundað á hesa meting, varð avgjørt at útseta framhald av hernaðarkanningini, sigur Anfinn Kalssberg.

### Svartabók

Og Anfinn Kallsberg nevnir eisini, at hann setti uml. 350.000 kr. á somu høvuðskonto til serliga útoyggjaverkætlan. Henda verkætlan verður framd í ár 2000 sum ætlað. Og løgmaður harmast um, at hann var noyddur at velja millum hesar báðar sera áhugaverdu verkætlanir, tí báðar vóru tær raðfestar høgt.

Og løgmaður kunnar eisini um í svarinum, at aðalorðaskifti verður um Svørtabók.

– Eftir hetta ætlar løgmaður at søkja um eykajáttan, so at farast kann undir framhaldandi hernaðarkanningar við serligum atliti at kanningum av skjølum í eys tureuropeiskum skjalagoymslum longu í ár, sigur Anfinn Kallsberg í svarinum.

# Fólkaatkvøða fyri 1. mió kr

*Á fíggjarlógini fyri 2000 eru bert settar av kr. 50.000 til val, sigur Høgni Hoydal í svari til fyrispurning frá Hans Paula Strøm*

ÓLAVUR Í BEITI

Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, spurdi herfyri sjálvstýrismálaráðharran Høgna Hoydal um játtan og nýtslu viðvíkjandi sjálvstýrismálum o.ø., og vildi hava at vita, um játtanin kemur at halda. Um landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum ikki metir, at játtanir fara at halda, hvørji stig verða so tikin, vildi Hans Pauli Strøm hava at vita í fyrispurninginum til Høgna Hoydal.

### Kunngerðarblaðið

Í svarinum sigur Høgni Hoydal, at tað kann gerast neyðugt at biðja um eykajáttan til § 10 í tveimum førum. Fyri tað fyrsta snýr tað seg um játtanina til kunngerðablaðið. Í fjør vórðu brúktar góðar kr. 480.000 til kunngerðablaðið. Játtanin fyri 2000 er kr. 300.000.

– Harumframt kemur, sum nakað nýtt, at sambært kunngerðablaðnum B, sum landsstýrið gevur út og fíggjar, eru ríkismyndugleikarnir farnir undir, ikki bert at kunngera tann tekstin, ið skal verða galdandi í Føroyum, men allan tann danska lógartekstin, sum hann er galdandi í Danmark.

– Heldur hetta fram, má roknast við einari fleirfalding av útreiðslunum til kunngerðablaðið, enn sett er av á fíggjarlógini fyri ár 2000. Landsstýrið hevur tikið spurningin um kunngerð av ríkislóggávu í Føroyum upp við ríkismyndugleikarnar, sigur Høgni Hoydal.

Og sjálvstýrismálaráðharrin lovar neyvt at fylgja gongdini við peninganýtsluni, og ætlar sær í góðari tíð at taka stig til at biðja um eykajáttan til hesa konto, um so er, at mett verður at hetta gerst neyðugt.

### Fólkaatkvøðan

Viðvíkjandi fólkaatkvøðuni, sum verður, sigur Høgni Hoydal, at landsstýrið ætlar, at sáttmáli millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri um fullveldi og samstarv frameftir, skal leggjast til fólkaatkvøðu í ár.

Høgni Hoydal metir, at ein fólkaatkvøða kostar umleið 1. mió kr., men á fíggjarlógini fyri 2000 eru bert settar av kr. 50.000 til val.

– Landsstýrið heldur eisini, at allir politiskir flokkar og møguligir aðrir felagsskapir, ið søkja um stuðul, skulu hava pening til upplýsing í sambandi við fólkaatkvøðuna. Landsstýrið fer tí at leggja fyri Løgtingið uppskot til eykajáttanarlóg viðvíkjandi hesum í samsvari við uppskot um fólkaatkvøðu, sigur Høgni Hoydal í svarinum.

# Sigursgongdin heldur fram

*Næstan 1000 fólk vóru um vikuskiftið til sjónleikin Seks í Pyjamas, tá hann varð spældur á Oyrarbakka*

Fólk streyma framvegis til sjónleikin hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag, Seks í pyjamas, og nú hava eini 3200 fólk sæð leikin.

Um vikuskiftið varð leikurin spældur á Oyrarbakka, og her var neyðugt við einari eykasýning, eftir at tær tríggjar ætlaðu sýningarnar vóru spældar.

Næstan 1000 fólk vóru til teir fýra sýningarnar, og tað vóru framvegis so nógv fólk, sum ikki sluppu til leikin, at Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur eina eykasýning á Oyrabakka mikukvøldið klokkan 19.00.

Eini 1300 fólk vóru til leikin í Klaksvík. Síðani vóru um 1000 fólk, tá leikurin varð spældur í Havn, og við teimum næstan 1000 á Oyrarbakka, kemur samlaða áskoðaratalið upp á eini 3200 fólk.



Ætlanin var annars at hava onkra eykasýning í Havn, men tað lat seg ikki gera.

Tá leikurin er sýndur á Oyrabakka aftur í annaðkvøld og í Suðuroy næsta vikuskiftið, roknar Klaksvíkar Sjónleikarfelag við, at leikurin hevur sligið met hjá felagnum.

Spælt verður í Royn-høllini í Hvalba fríggjakvøldið klokkan 21.00 og leygardagin klokkan 17.00 og 20.00.

Tað er Egi Dam, sum hevur leikstjórnað leikinum, og seks leikarar eru á pallinum.

**ek**

# Samráðingarnar krossmessuaftan

Tað var stuttligt at síggja hvussu føroyska samráðingarnevndin næstan fekk fólk burtur úr Nyrup á samráðigarfundinum krossmessuaftan 2. mei. Nú tosaði hann um tann óhefta føroyska statin sum ein veruleiki, og segði tað sum alla tíðina hevur verið roknandi við, at tað fór at fáast ein góð loysn burtur úr á hesum samráðingum.

Tað er púra rætt av føroysku samráðingarnevndini at halda fast við, at tað als ikki kann góðkennast, at vit skulu hava eina fýra ára tillagingartíð. Hetta er nevnliga ikki tað, sum danir lótu Ísland fáa, tá hetta land gjørdist sjálvstøðugt í 1918, og okkara støða nú er tann sama, sum støða Íslands var tá.

Tá Nyrup sigur hetta ikki vera so, talar hann ímóti betri vitandi. Sjálvandi vóru tølini lutfalsliga smærri, sum Ísland hevði í 1918, men orsøkin til tað var, at fíggjarliga loysingin Íslands og Danmarkar millum hendi í tveimum stigum. Í 1872 ásetti danska stjórnin í fyrstu syftu, at íslendska stjórnin skuldi fáa heimild til at krevja upp tann skatt, sum danski staturin annars kundi kravt upp í Íslandi. Afturfyri skuldi Ísland rinda allar tær útreiðslur, sum vóru av rættarskipanini, løgregluni, skúlaskipanini, almannaskipanini og hospitalsverkinum. Tí var mestsum einki eftir hjá danska statinum at gjalda tá annað stigið varð tikið í 1918.

Tað sama hevur danski staturin altíð kunnað gjørt í Føroyum. Við heimastýrisskipanini samtykti Føroya løgting harumframt, at danski staturin nær sum helst kundi áleggja føroyska heimastýrinum at yvirtaka øll tey mál, sum stóðu á lista A. Avleiðingin av hesum hevði verið, at vit skuldu goldið allar útreiðslurnar av t. d. skúlum, almannastovuni og sjúkrahúsverkinum.

Tað er bert tí at danski staturin ikki hevur álagt okkum at gjalda hesar útreiðslur, at statsins útreiðslur í Føroyum eru lutfalsliga størri enn tær vóru í Íslandi í 1918. Fyri at danski staturin skal sleppa burtur úr hesum óskili á sama hampuliga hátt sum í Íslandi, er tí neyðugt við størri upphæddum. Tað sigur seg sjálvt, at tað kapitaliseraða virði av eini veiting upp á 1300 milliónir krónur er størri enn av eini veiting upp á 60.000 kr.

Men av tí at tann principiella støðan er tann sama, so kunnu vit sjálvsagt ikki finna okkum í at fáa eina verri viðferð í tí fíggarliga partinum av sáttmálanum enn íslendingar fingu.

Tí var tað rætt av føroysku samráðingarnevndini als ikki at boyggja seg fyri Nyrup í hesum partinum av samráðingunum, og tað var gleðiligt at síggja at Annfinn her stóð sum kletturin.

Tað verður spennandi at síggja hvussu leingi danska stjórnin kann halda upp á sín órætt í hesum spurningi, men við so góðum samráðarum, sum vit hava, fer tað helst ikki at vera leingi.

Tá fara vit at fáa ein sáttmála til fólkaatkvøðu, sum er so góður, at eingin føroyingur kann siga nei til hann. Fólkaatkvøðan fer tá er vera ein *katharsis*, ein reinsan, sum fer at sjóða tjóð okkara saman, soleiðis at vit megna allar tær avbjóðingar, sum fara at møta okkum í royndum okkara at gera Føroyar til heimsins besta land at búgva í.

**Zakarias Wang, 2. mei 2000**

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo